Nr. 3

7. juni 1991

# Eykaprógv

## í føroyskum

Við heimild í § 36, 2. stk. í løgtingslóg nr. 21 frá 22. mars 1979 um fólkaskúlan ásetir Landsskúlaráðið hesar reglur um eykaprógv í føroyskum:

**§ 1.** Landsskúlafyrisitingin ger av, nær skeið til eykaprógv í føroyskum verða hildin.
**2. stk.** Skeiðini verða hildin á Føroya Læraraskúla.

**§ 2.** Lærusetningur, tímatal og próvtøkutreytir eru tey somu, sum til felagsgreinina føroyskt á Føroya Læraraskúla.
**2. stk.** Skeiðið fevnir um tvær lestrarhálvur.
**3. stk.** Møtiskylda er til tímarnar.

**§ 3.** Farið verður til próvtøku saman við 3. flokki á læraraskúlanum eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri próvtøku á Føroya Læraraskúla.
**2. stk.** Treytin fyri at fáa eykaprógv í føroyskum er, at hin lesandi eisini í talu dugir at málbera seg á føroyskum.

**§ 4.** Landsskúlafyrisitingin tekur støðu til, um umsøkjarin kann fáa hægri prógv í føroyskum og øðrum norðurlendskum máli góðkent sum eykaprógv í føroyskum, ella um viðkomandi skal lesa ein part av lærusetninginum í felagsgreinini føroyskum og síðani fara til próvtøku saman við 3. flokki á Føroya Læraraskúla.

**§ 5.** Undirvísingin er ókeypis. Landsskúlafyrisitingin ber kostnaðin av undirvísiningi.
**2. stk.** Landsskúlafyrisitingin ger av, hvørt aðrar útreiðslur, sum standast av eykapróvnum, t.d. ferðaútreiðslur og útreiðslur til vikar, heilt ella lutvíst skulu gjaldast av tílesandi.

Hetta rundskriv kemur í gildi beinanvegin.

Landsskúlafyrisitingin, 7. juni 1991

Hensar Ellingsgaard

/ Petur J. Sigvardsen